

# Lýsa trygdarøki rundan um boripall

**Jan Müller**

30.05.2014 - 22:16

Oljan.fo

Mótmælistiltakið hjá Greenpeace hevur fingið norsku myndugleikarnar ast skipa eitt trygdarmark á leiðini, har pallurin Transocean Spitsbergen skal bora í Barentshavinum.

Hóast Greenpeace-fólkini fóru av pallinum hósnáttina, forðar Greenpeace framvegis boringini, tí felagsskapurin hevur lagt skipið Esperanza á júst tað staðið, har pallurin skal bora.

Håkon Smith-Isaksen í olju- og orkumálaráðnum sigur við tíðindastovuna NTB, at trygdarmarkið, sum er sett rundan um boristaðið, er 500 metrar í tvørmát. Markið er ein fyribilsskipan og er galdandi, til eitt veruligt trygdarøki er sett fyri staðið, sigur hann.

Avgerðin hjá myndugleikunum merkir, at bara skip, sum eru knýtt at boringini, kunnu koma inn um teir 500 metrarnar.

Sambært norska Greenpeace-formanninum, Truls Gulowsen, hevur Statoil biðið myndugleikarnar senda sjóverjuna á staðið at reka Esperanza burtur haðani, men enn hevur skipið ikki fingið boð um at fara, sigur hann við NTB.

Í gjár handaði Greenpeace norska veðurlags- og umhvørvismálaráðnum 120.000 undirskriftir frá fólki, sum mótmæla boriætlanini hjá Statoil.

Boringin hjá Statoil er nærhendis Bjarnoynni og er tann norðasta í heiminum.